# BitTing um ílegugransking

Á Hotel Føroyum fríggjadagin 3. februar 2006 kl. 9.00-12.00.

Føroyska styrkin í sambandi við ílegugransking liggur fyrst og fremst í føroyska íleguarvinum. Føroyska populatiónin er einsháttað, og livir undir einsháttaðum umhvørvisligum ávirkanum. Veikleikin er at vit hava sera avmarkaðan kunnleika og førleika innan ílegugransking í Føroyum.

Bitland hevur síðani oktober 2004 kannað útlendskan áhuga fyri ílegugransking í Føroyum. Endamálið hevur verið at kanna, hvussu hesin áhugi kann gagnnýtast í Føroyum, bæði innan heilsu, útbúgving og vinnu.

Frágreiðing er nú skrivað, og høvuðsniðurstøðurnar verða lagdar fram á komandi BitTingið, sum fer at kunna um og viðgera granskingarmøguleikar í føroyskum ílegum, bæði við atliti at fólka- og fiskasjúkum. Somuleiðis verður greitt frá ætlanum hjá landsstýrinum um hesi viðurskifti.

**Skrá 3. februar kl. 9.00-12.00:**

09.00 Bitland bjóðar vælkomin

09.15 Regin Hammer, prosjekleiðari, leggur fram úrslit av kanningini hjá Bitland

09.45 Hans Atli Dahl, granskari, leggur fram um Føroya Prosjektið og úrslit higartil

10.15 STEÐGUR

10.30 Torben Kruse, professari, generelt um genetiska gransking og isoleraðar populatiónir

11.00 Debes Christiansen, granskari, leggur fram um ílegugransking í fiski og fólk

11.30 Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, greiðir frá ætlanum landsstýrisins um ílegugransking

12.00 Endi

BitTingið er skipað sum eitt alment tiltak. Luttøkugjaldið er DKK 500 + MVG fyri hvønn. Vinarliga boða frá luttøku í seinasta lagi hós. 2. februar hjá Bitland við telduposti til go@bitland.fo, á tel. 31 10 85 ella fax 35 66 01.

bitland.fo

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundur Skála Handverkarafelags verður fríggjadagin 17. februar 2006.

Tíð og stað verður lýst seinni.

Skrá sambært lógum felagsins.

Støðutakan til húsakeyp.

Allir limir eiga at møta.

**Nevndin**

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**

*HEIMARØKTIN*

# Lýsing eftir starvsfólki til Røktarheimið á Mørkini í Streymnesi

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum og heilsuhjálparum til nýggja Røktarheimið í Streymnesi at byrja 01. mars 2006 ella skjótast tilber.

Røktarheimið er partur av Heimarøktini øki 2, og pláss er fyri 32 búfólkum, sum koma at búleikast í 4 eindum við 8 búfólkum í hvørjari eind.

**Hugsjónin fyri Heimið:**
Miðað verður eftir at skapa eitt heimligt og virkið umhvørvi og við virðing og umsorgan at stuðla undir virkisførleika og vælveru hjá tí einkulta búfólkinum.

**Vit vænta av tær, at tú hevur:**
- Áhuga í og gleði við at arbeiða við eldri fólki
- Vilja til at starvast í tráð við hugsjónina fyri Heimið
- Er til reiðar at bróta upp úr nýggjum og ganga aðrar leiðir
- Dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- Er motiverað og fleksibul
- Kann arbeiða í skiftandi vaktum

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt spennandi og mennandi starv, har tú hevur møguleika at vera við til at byggja upp eitt heim í tráð við hugsjónina fyri Heimið og seta dám á umhvørvið.
- Góða innleiðslu
- Møguleika fyri persónligari menning

**Setanar- og lønarviðurskifti:** Lønar og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.
Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina við setanarstaði í Heimarøktini.
Tænastustaðurin fyribils er Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy.
Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara á tlf. 333249/282249

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi , viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy**
Att: Sonja Klein, økisleiðari
Økisskrivstovan
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist 13. februar 2006**




**Føroya Maskin- og sjómansskúli**

Postrúm 104 • Nóatún 2 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 357500 • Fax +298 357502
farnav@farnav.fo • www.farnav.fo

# Avloysarastarv sum skeiðslærari

**Starvið**
Undirvísing í brunaverju, eldsløkking og roykkaving. Til- og avriggan í sambandi við skeið. Viðlíkahald av sløkki- og aðrari útgerð.

Tey, ið fáa upplæring í eldsløkking á Brandskúlanum, eru í høvuðsheitinum: Sjófólk, sløkkiliðsfólk og starvsfólk á virkjum og stovnum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum skipsførari ella maskinmeistari ella aðra útbúgving, sum kann javnmetast. Umsøkjariar, sum eisini hevur útbúgving sum brunaumsjónarmaður, hevur fyrimun.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur við at arbeiða við teldu.

Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevni, vera fyrikomandi, ágrýtin og førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Starvstíðin er 1 ár.
Tann ið settur verður, skal byrja skjótast tilber.

Lønar- og setanartreytir, verða sambært sáttmála millum: Fíggjarmálaráðið og Felagið Maskinmeistaralærara saman við Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum.

Arbeiðsstaðið er við Áir, tó verður nakað av undirvísing á Føroya Maskin- og Sjómansskúla í Tórshavn.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til:

**Føroya Maskin- og Sjómansskúla**
Postrúm 104
Nóatún 2
FO-110 Tórshavn

Umsóknir saman við avriti av prógvum, og møguligum viðmælum, skulu vera Føroya Maskin- og Sjómansskúla í hendi í seinasta lagi: 13. februar 2006, kl. 1200.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til: Signheðin Davidsen á tlf. 422354, ella Hans Johannes á Brúgv á tlf. 357501.

**HÚS Í TRONGISVÁGI TIL SØLU**

**um hóskandi boð fæst, matr.nr 144k í Trongisvági.**

**Nærri fæst at vita á tel 372 201 ella 272 662**